


*Nr. 23* *10. november 2013* *73. árg.*

# Innbjóðingin

*Men tey vildu ikki koma. Matt. 22,3.*

Alt var gjørt til reiðar, innbjóðingin var send út, og tey bíðaðu eftir gestunum, men tey bodnu vildu ikki koma.

Hví ikki? Hvat er tað fyri vald, sum myrkir fyri eygunum á menniskjum og trælabindur viljan. Hvussu ber tað til, at so mong ikki leggja í at koma í brúdleypið? ”Jerúsalem, Jerúsalem!….hvussu ofta havi eg viljað savnað børn tíni saman, eins og ein høna savnar ungar sínar undir veingirnar,” segði Jesus og legði afturat ”og tit vildu ikki.” Tú hoyrir vónbrotið í orðum hansara.

Um hetta eina biður hann: **Komið!** Komið og síggið! Komið til mín. Tann, sum kemur til mín, skal ikki hungra. Tann, sum kemur til mín, vil eg als ikki reka burtur. Og kortini vilja tit ikki koma til mín og liva. Í so máta er mannahjartað oyðilagt, og vit frásiga okkum størsta tilboðið av øllum. Sum tað er løgið!

Hví vilja vit ikki koma? Vit eru øll somul undir ákæru. Hví umbera vit okkum. Hví er áhugi okkara so lítil? Hví er hetta ikki um at gera hjá okkum? Mangar orsakir kunna verða nevndar. Skuldarkenslan er viknað. Jesus Kristus er ikki tann ráðandi veruleikin í gerandisdegnum. Vit eru vaksin føst í hesum jarðiska. Sjálvgóðskan og máttloysiskenslan gera tað, at himmalin verður so fjarur. Heimshendingarnar og trupulleikarnir í okkara egna lívi binda hugsanirnar, so har verða hvørki rúm ella stundir til tað veruliga.

”Men tey vildu ikki koma.” Onki er meira umráðandi enn at koma til Kristus, meðan tað enn er tíð. At koma til Kristus er at líta seg til hansara, viðganga, hvussu til stendur, og biðja hann um eina nýggja byrjan. Biðja um, at tað gerst umráðandi at koma í brúdleypið, har øll eru boðin við.

*Hvør vil við til himmiríkis?*
*Komið, Jesus rópar nú;*
*komið fátækir og ríkir!*
*Snúgvið sál at himna bú!*
*Hesum heimi vendið bak´,*
*tíðin nærkast: bið og vak!*
*Ei er stund at vála, reika*
*og í heimsins lystum leika!*

*Kristmenn, mennist nú í megi!*
*Stevnið treystir fram á mál,*
*gangið glaðir á Guds vegi,*
*lýðið hann av hug og sál!*
*Standið stinnir við hans lið,*
*størri alsk tit sýnið við;*
*fremjið góðsku millum manna,*
*Elskið næsta, elskið granna!*

# Tá ein mamma biður

"Um henda drong bað eg, og Harrin veitti mær tað, sum eg bað um." 1. Sám. 1,27.

Øll yvirgangsfólk hava einaferð verið børn. Tað hava allir trúboðarar eisini. Munurin liggur í ávirkanini hjá øðrum av foreldrunum. Sámuel profetur stóð á odda fyri Ísrael í 40 ár, og hann gav Dávidi kongi ráð í teimum mest týðandi avgerðunum; men hvør hevði størstu ávirkanina á lív hansara? Mamma hansara!

Hoyr: "Nú vil eg geva Harranum hann aftur, so hann kann tæna Harranum restina av ævi síni." 1. Sám. 1,28. So leingi, sum tú hevur børn tíni, skalt tú halda um tey, elska tey, ansa eftir teimum og læra og menna tey. Men minst til, tú ert ein tænari og eingin ognarmaður. Børn tíni hoyra Gudi til, ikki tær!

Einaferð eru tey so vaksin, at tey fara frá tær. Síggj til, at tey hava eitt andaligt akker, tí tey fara at renna seg í mangar stormar í lívinum. Tú skalt ongantíð undirmeta ta styrkina, sum liggur í eini bøn, sum ein pápi ella mamma biðja vegna barn sítt. Hvør veit, hvussu mangar bønir beint nú verða svaraðar, tí at ein trúføst mamma áhaldandi hevur biðið í 10 ella 20 ár?

Um tú í hesum rokmikla samfelagi ikki hevur stundir at biðja fyri børnum tínum, so hevur tú ov mikið at gera. Tað er einki, sum er meira serstakt og dýrabart enn tann tíðin, ein pápi ella mamma brúka at fara í bøn til Guds fyri børnum sínum. Tað er ikki ov seint fyri tað barnið, sum tú grætur um. Hugsa um Jesu móður, sum mátti síggja son sín krossfestan, men sum eisini fekk gleðina at síggja hann upprisnan frá deyðum.

Tú kanst alt lívið á tamb grunda yvir, um bønir tínar nakrantíð verða svaraðar, men halt á at biðja.

Tí Gud lurtar, tá ið ein mamma biður!

"… et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

# Fyrigeving

*Men hjá tær er syndafyrigeving. Sálmur 130,4.*

Okkum menniskjum tørvar rættvísi – tað er: til náðigu syndafyrigeving okkara. Hetta kenst sterkast á ungum árum. Tú kennir teg ongantíð veruliga glaðan. Tú gongur kanska leingi og hugsar, at hetta stendst av ov lítlum gamansleiki og stuttleika. Ella tú roynir at fáa tær eyka arbeiði fyri at gloyma hetta óglaða huglagið. Tú finnur tær kanska eitt ítriv at hjúkla um, men onki hjálpir.

Men tað, sum bagir, er, at tú kennir teg sekan, altíð sekan!

Men so kemur evangeliið og sigur tær, at hjá Gudi er syndafyrigeving. Hjá Gudi sleppur tú frá skuldarkenslu tíni, so tú verður glaður aftur. Og vilt tú hava ein góðan samvitsku-sáttmála við Gud, so skal tilboðið í evangeliinum um frelsu ljóða sterkari í tær, so at tú at enda mást boyggja teg og taka ímóti tí hondini, sum loysir skuldarkenslunnar leinkjur av tær.

Vilt tú verða glaður? Glað? Lat Jesus so bera skuld tína fyri teg! Hann tekur ímóti syndarum.

*Tú, sum leinkjur slítur,*
*loysir trælabond,*
*brákað rør ei brýtur,*
*grøðir særda ond,*
*sál mín til tín gongur,*
*eigur besta lut,*
*ei ein trælur longur,*
*men títt barn, o, Gud.*

*t*. týddi.

# Eitt er neyðugt

Sagt verður um kenda granskaran Isaac Newton, at andsevnini seinastu dagarnar í lívinum versnaðu, og at serliga minnið sveik. Hesar veikleikar bar hann tolin.

Ein dagin, tá ið minnið aftur hevði svikið í eini týdningarmiklari sak, og ikki kundi verða bøtt um mistakið, segði hann stillisliga: ”Hevði eg, ið hvussu er, ongantíð gloymt, at eg eri ein stórur syndari, men at Jesus er ein uppaftur størri frelsari.”

*t*. týddi.

# Halt dampinum uppi!

*"Eg kann vitna, hvussu nógv hann hevur stríðst." Kol. 4,13.*

John Wesley, sum stovnaði metodistkirkjuna, ferðaðist meir enn 400.000 km á rossabaki, í miðal um leið 25 km um dagin, í 40 ár. Hann helt 40.000 prædikur, skrivaði 400 bøkur og dugdi tíggju ymisk mál. Tá ið hann var 83 ár, var hann ónøgdur við, at hann ikki orkaði at skriva í meir enn 15 tímar, uttan at hann fekk ilt í eyguni. Tá ið hann var 86, skammaðist hann, av tí at hann bert megnaði at prædika tvær ferðir um dagin. Í dagbók síni gremur hann seg um vaksandi hug at verða liggjandi í songini til klokkan seks. Eitt orð, sum kundi staðið sum yvirskrift yvir lívinum hjá Wesley, er eldhugi.

Paulus skrivar: "Epafras letur heilsa tykkum ... hann stríðir altíð fyri tykkum í bønum sínum, fyri at tit mega standa fullkomnir og fullvísir í øllum vilja Guds. Tí at eg gevi honum tann vitnisburð, at hann hevur mikið stríð fyri tykkum." Kol. 4,12-13.

Vit tosa um at halda dampinum uppi. Henda máliskan verður brúkt, tá ið talan er um lokomotiv. Dampur er bara vatn, ið verður broytt til orku.

Kate Eaton skrivaði: "Tú sært hann beint uppi yvir tí bríkslandi ketlinum ella á speglinum inni í baðirúminum, men tað er ikki tann dampurin. Dampur er hin reina guvan millum heitt vatn og hina sjónligu døggina. Hann verður gjørdur við 100 stig Celsius, og hann veksur og kemur at fylla nógvar ferðir meira enn flótandi vatn.

Hetta er tann spreingiliga økingin, tamd í stórum lokomotivum, sum lótu kraft til 250 tons tungar maskinur og gjørdi tað møguligt hjá teimum at dragsa 20 ella enn fleiri jarnbreytarvagnar tvørtur um villingarsom fjøll, stórar fløtur og gjøgnum øgiligar oyðimerkur. Hetta er ein veldig kraft."

Um tú arbeiðir fyri Gud, mást tú brúka tíð saman við Gudi, annars kanst tú ikki halda dampinum uppi.

"… et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 10. nov. | Tekstur: | 2. Mós. 2,1-10; | bíbliuorð: | Jer. 29,11 |
| 17. nov. | Tekstur: | 2. Mós. 3, 1-14; | bíbliuorð: | 2. Mós. 3,12 |
| 24. nov. | Tekstur: | 2. Mós. 4,1-17 og 12,28-40; | bíbliuorð: | 2. Mós. 12,13 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74